VIÐMERKINGAR

# Tey bíða enn

**- aftursvar til Jógvan við Keldu, landsstýrismann í útlendingamálum**

**Jón Brian Hvidtfeldt**
*tíðindamaður*

**Jóhann Mortensen**
*tíðindaleiðari*





Familjan Rapa í Vestmanna hevur nú í 10 mánaðir bíðað eftir svari, um tey sleppa at vera verandi her í landinum, ella um føroyska samfelagið gevur teimum ein einvegis ferðaseðil aftur til Rumenia eftir seks og einum hálvum ári í Føroyum. Hóast tey í marts mánað í fjør søktu um loyvi at sleppa at vera verandi her í landinum, veit familian Rapa enn tann dag í dag ikki, um tey eru keypt ella seld. Um tey eisini í morgin sleppa at vera partur av føroyska samfelagnum. Hetta er teirra veruleiki, teirra dagliga óvissa, teirra gerandisdagur.

Hesa støðuna hevur Útvarpið lýst um ársskiftið.

Men tað skulu vit helst ikki tosa ov hart um. Heldur skulu vit tosa um, hvussu stórt, fløkjasligt og trupult útlendingamálið er at umsita. Hvussu mannagongdirnar eru, tá útlendingamál skulu viðgerast í Innlendismálaráðnum.

Hvussu trupult Integrationsministeriet niðri í Danmark hevur havt við at endurskoða útlendingaøkið. Hvørjir myndugleikar annars eru inni í myndini.

Og hvussu arbeiðsorkan í Innlendismálaráðnum varð skerd, tá miðfyrisitingin í heyst skuldi spara.

Í eini sending nýggjársaftan tosaði Útvarpið við familjuna Rapa í Vestmanna.

Og familjan tordi at siga síga sína søgu. Uttan at spyrja Jógvan við Keldu um loyvi.

Samrøðan við hjúnini varð endurgivin í tíðindunum nýggjársdag. Og tá fór apparatið í Innlendismálaráðnum í gongd: Útvarpið hevði ikki skilt nakað sum helst av nøkrum. Síðani hevur útvarpið fleiri ferðir roynt at fingið viðmerking frá Jógvani við Keldu. Men landsstýrismaðurin hevur hvørja ferð vart seg við, at talan er um eitt persónsmál, og tí vil hann ikki gera viðmerkingar til tað. Eftir okkara tykki, kundi hann um ikki annað havt sagt, at Innlendismálaráðið hevði avgreitt málið 17. desember. Tað gjørdi hann heldur ikki.

Eisini hevur landsstýrismaðurin bjóðað útvarpinum oman í innlendismálaráðið "at fáa alla ta kunning, okkum lystir." Til tað er at siga, at vit eru samd við landsstýrismannin um, at talan er um eitt persónsmál. Eitt mál, ið snýr seg um tríggjar mannalagnur - eini hjún og lítla barn teirra. Men tað er ikki meira persónligt enn so, at tey alment vildu vera við í eini útvarpssending á nýggjárinum.

Men hvar er rættartrygdin hjá teimum, og hava tey ikki rætt til eitt svar?

– Onga viðmerking, var títt svar til útvarpið, Jógvan við Keldu!

Kunningin, ið landsstýrismaðurin so vinarliga bjóðaði útvarpinum, var um útlendingamál sum heild. Men vit skuldu kortini ikki ditta okkum at spyrja um, hví eini hjún framvegis ikki hava fingið svar, eftir at hava bíðað í 10 mánaðir. Ella hvat landsstýrismaðurin heldur um eina so langa viðgerðartíð av einum máli. Ella hvar málið liggur í dag, og nær tey kunnu vænta sær at fáa svar.

Seinasta stigið hjá landsstýrismanninum er at senda eina "klagu" til útvarpsstjóran umvegis sín egna fjølmiðil, nevniliga heimasíðuna hjá Innlendismálaráðnum.

Í skrivinum hjá landsstýrismanninum er tíðindaflutningurin hjá útvarpinum skýrdur at vera "skilaleysur". Hann skrivar eisini, at einki er "yvir at dylja, at tíðindaflutningurin hjá Útvarpi Føroya hevur verið alt annað enn á rímiligum støði". Og landsstýrismaðurin fer enntá so langt sum at skriva, at "tað er undir alt lágmark, at ein almennur loftmiðil loyvir sær at fremja slíkan tíðindaflutning."

Skrivið frá Jógvani við Keldu, sum varð lirkað inn í bæði Sosialin og tvær ferðir í Dimmalætting, kann illa tulkast sum nakað annað enn eitt roykták, ið skal flyta fokus frá kjarnuni í málinum.

Landsstýrismaðurin nýtir harafturat í brævinum sítt mandat til á sera ófólkaligan og grovan hátt beinleiðis at sáa iva um tíðindaflutningin hjá útvarpinum, og hann ger harumframt enn eina roynd at kvala málið í undanførslum um truplar mannagongdir. Og hvat meinar landsstýrismaðurin við, tá hann skrivar, at "tað er undir alt lágmark, at ein almennur loftmiðil loyvir sær..." Setningurin kann illa tulkast øðrvísi enn at landsstýrismaðurin vil sleppa at ráða yvir, hvat hesin almenni fjølmiðilin borðreiðir við av tíðindum. Og tað luktar av sensuri.

Ein ljósglæma er kortini at hóma úr øllum royktákinum úr Innlendismálaráðnum. Landsstýrismaðurin hevur nú sagt, at umsóknin hjá familjuni Rapa í Vestmanna varð avgreidd í Innlendismálaráðnum 17. desember í fjør og haðani send Udlændingestyrelsen umvegis politiið. Men tey bíða enn í Vestmanna.

## Kirkjan vísir samkenslu

Øll eru vit rakt av hervilигu vanlukkuni í Asia. Og nú ætlar Føroya biskupur at kirkjan vísir samkenslu við offrini eftur tsunami-vanlukkuna.

Í eini fráboðan sigur Hans Jacob Joensen, biskupur at nú verður skipað fyri eini serstakari gudstænastu í hesum sambandi. Talan er um eina forbønar- og minningargudstænastu fyri tey, ið eru rakt av hesi vanlukkuni.

Henda serstaka gudstænastan verður hildin í dómkirkjuni sunnukvøldið 16. januar kl. 20. Undir gudstænastuni fer talvan at ganga til frama fyri hjálpararbeiðið í Fjareystri.

## Ísraelsfelagið brynjar seg til eitt nýtt ár

Nevndin í felagnum hevur nú skipað seg við nevndarlimum, ið allir hava royndir í felagnum

Eftir eitt virkið ár í fjør, fer Ísraelsfelagið nú at leggja ætlanir fyri hetta komandi árið. Hetta hendir á einum fundi seinni í mánaðinum, har nýskipaða nevndin hittist aftur.

Eftir seinasta aðalund, sum hildin varð 31. oktober 2004, hevur nevndin fyri Ísraelsfelagið skipað seg við Svenningi av Lofti, sum formanni og Maigun Solmunde úr Syðrugøtu sum næstformanni.

Hinir nevndarlimirnir eru annars: Henrikka Øregaard, Fuglafirði. kassameistari, Poul Johan Djurhuus, Glyvrar, skrivari, og Brynhild B. Poulsen, Tórshavn.

Eykalimir eru Sanna Hammer, Tórshavn og Jákup S. Joensen, Miðvágur.

## Roynd nevnd

Allir nevndarlimirnir í felagnum eru gamlir í garði og hava verið í nevndini í mong ár, við undantak av Rikku Øregaard sum ikki nevndarlimur í seinasta skeiði. Hon hevur tikið sætið sum kassameistari eftir Álv Kirke, sum hevur verið kassameistari frá stovnan felagsins í 1996. Formansskapurin er hin sami sum seinastu árini.

Í fjør hevði felagið vitjan av Jørn Nielsen úr Danmark, sum er kendur frá skriving síni í dagbløðum. Hann helt fyrilestur á aðalfundinum og ferðaðist síðani kring landið og helt fyrilestrar um Ísrael og profetiska orðið um Ísrael í Eysturoynni, Klaksvík, Suðuroy og á Sandi.

Í eini frásøgn frá felagnum verður víst á, at felagið er fegið um at viðurskiftini í miðeystri tykjst vera betri millum palestinar og jødar.

- Útlitini fyri eini friðarloysn tykjast betri nú, ið Arafat er deyður. Nýggi leiðarin Abbas, tykist vera meiri semingshugaður, sigur felagið.

Ísraelsfelagið er tó eisini virkið á øðrum økjum. Í fjør var felagið og Vinir Ísraels í Føroyum saman um ein innsavning, sum gav eitt gott úrslit, umleið 80.000 kr. Henda upphæddin verður latin viðurkendum felagsskapum í Ísrael at hjálpa jødum og palestinum, ið eru komin illa fyri orsakað av sjálvmorðsatsóknum og hernaðaratsóknum.

**sb**

Viðmerking til greinina:

# Stuðla tit Jógvan við Keldu

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Justinus Eidesgaard blaðmaður hevur bersøgna og beinrakna viðmerking í Sosialinum 6. januar, ið ber omanfyri nevnda heiti. Í hesi grein verður undirritaði nevndur sum ein av teimum tigandi í útlendingamálinum og niðurstøðan er, at "**tann sum tegir, hann samtykkir**".

Tað skal ikki vera nøkur loyna, at løgtingslimur Sjálvstýrisfloksins eisini er millum teirra, sum er sera misnøgdur við avgreiðsluna av arbeiðs-og uppihaldsloyvum í Innlendismálaráðnum. Tá Løgmálaráðið hevði umsitingina, var avgreiðslutíðin 3 til 4 mánaðar, men tá varð sagt, at hetta komst av seinu viðgerðini í Udlændingestyrelsen. Hetta árið, Innlendismálaráðið hevur havt uppgávuna og fráboðanin kom um, at danir vildu viðgera umsóknirnar samsvarandi tilmælum føroyinga, hevur verið heilt galið. Haldi ikki, at eg havi sett ljósið undir skeppumálið í hesum máli, men óttin fyri, at mín framferðarháttur skal skaða viðgerðina hjá teimum, ein so fegin vil hjálpa, er høvuðsorsøkin til, at ikki hevur verið rópt harðari.

Havi í tinginum víst á mína ónøgd, við fyrispurningi til Jógvan við Keldu, men hjúnini í Vestmanna eru tíverri ikki eindømi. Her í kommununi eru fleiri einstaklingar og familjur, íð mánað eftir mánað sita við bangnum hjarta og bíða eftir, at postboðið kemur við tí avgerandi svarskrivinum um framtíðar lagnu teirra, um tey fáa longt arbeiðsloyvi ella ikki.

Eg fari her í blaðnum at seta Jógvani við Keldu landsstýrismanni hesar spurningar.

*Tá bíða verður í nærum eitt ár eftir svari; er arbeiðsloyvi so galdandi frá útskrivingardegnum og eitt ár fram, ella er tað veruliga so galið at tilsøgnin verður givin frá dagfestingini á umsóknini og eitt ár fram, tvs. nærum útgingin, tá umsøkjarin fær hana ?*

*Fleiri tinglimir hava víst á ónøgd við avgreiðslu av arbeiðs/uppihaldsloyvum, seinast John Johannesen samgongulimur. Nær kann væntast, at viðurskiftini verða "normaliserað".*

*Landstýrismaðurin hevur á tingsins røðarapalli eftir fyrispurningi frá partamanni boðað frá, at hann ætlaði at seta ein bólk, umboðandi allar teir politisku flokkarnar, at viðgera útlendingaspurningin. Nær fer landsstýrismaðurin at seta nevnda bólk ?*

Løgmaður nevnir í nýggjársrøðu síni, at vit mugu velja, um vit vilja lata upp fyri teimum møguleikum, sum eitt víðkað samstarv við útlendingar og umheimin gevur, ella vit óttast hesa avbjóðing og lata aftur. Her vildi eg ynskt, at løgmaður boðaði frá, hvørjar framtíðarvónir teir útlendingar, ið valdu at koma higar til lands at arbeiða kunnu vænta sær. Fleiri hava búleikast her í nógv ár, hava greitt sínar samfelagsskyldur til fulnar og keypt hús og heim. Hesir einstaklingar og familjur ganga í støðugum ótta fyri at verða víst av landinum, nú tey eru blivin ein náttúrligur partur av samfelagnum, hava lært seg málið, eru vældámd á arbeiðsplássinum og av bygdafólkinum, eins og børnini klára seg eins væl og okkara í skúlanum.